gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Vágamenn komu úr ongum og tóku alt



*Tá dysturin var av, hevði VB ikki nógv at fegnast um*

**Meistaraliðið fekk vánaligastu upptaktina til Europa Cup, sum tað ber til at ímynda sær**

Tað er ikki ókent, at eitt lið, sum hevur stóra altjóða avbjóðing fyri framman, heilkiksar. Tað hevur fleiri ferðir verið at sæð uttanlands, og í Føroyum er hetta meiri enn so komið fyri.

Men tað var fullkomuliga skelkandi, at vágbingar sunnudagin skuldu tapa í Miðvági. Hóast talan hevur verið um framgongd, so hava ongar ábendingar tær síðstu vikurnar verið um, at vágaliðið skuldi ogna sær stig undan summarsteðginum.

VB var á odda 2–0, tá tíggju minuttir vóru eftir, og tað var púra óhugsandi, at roynda meistaraliðið skuldi kiksa so, sum teir kortini gjørdu.

Vágbingar høvdu allar møguleikar fullkomuliga at taka allan spenningin burtur. Í 1. hálvleiki komu teir á odda 1–0, tá Jón Pauli Olsen við skoti úr vinstru rakti í beinið á verjuspælara, so bólturin snýtti Arturas Ramoska, sum annars var ein góður aftasti skansi hjá FSV. Og so var tað, at VB í 1. hálvleiki hevði tríggjar risa møguleikar at skora bæði tvey og trý mál afturat, men Robert Cieslewicz og Palli Augustinussen sendu úr fullkomuliga leysum støðum, tá eisini Ramoska var úti av spælinum, í tvørtræið.

Vágbingar iðraðu seg um søplaðu møguleikarnar, men tá teir í sera tama 2. hálvleiki øktu til 2–0, var ikki neyðugt at harmast so almikið. Miðvingurin í VB, Birgir Jørgensen, sum hevur skorað so at siga hvørja ferð, síðani hann aftur gjørdist fastur maður hjá vágbingum, var meistari fyri seinna málinum, eftir at hann var vorðin púra leysur í brotsteiginum.

## Gylta løtan

Vágbingar vóru sera ágangandi fyrsta korterið. Tá var tað, at teir áttu at havt avgjørt. So gjørdist tað meiri javnt, og bæði Birgir Joensen og Kim Poulsen høvdu møguleikar, sum heimaliðið kundi havt skorað uppá. Birgir lobbaði upp um Bjarna Johansen og við síðuna av málinum, og Kim Puolsen sendi skeivu megin stólpan.

Tá havt verður í huga, hvussu tað nógvu tær seinastu ferðirnar hevur roynst hjá FS Vágum í seinna umfarinum og serliga í síðstu løtuni, so hevði tað ivaleyst verið rætt av VB í 2. hálvleiki at sett FSV undir trýst og harvið kroyst teir at gera mistøk. Men tað gjørdi VB ikki. Í staðin lótu teir tað ganga fyri seg, soleiðis sum heimaliðið vildi, og síðstu tíggju minuttirnar vóru meistararnir sektaðir. Ikki bara eina ferð, men bæði tvær og tríggjar ferðir. Harvið vóru øll stigini eftir í Vágum, og VB tykist fyribils at hava mist alla vón um tvey tey ovastu plássini.

Sonni Johansen og Tór–Ingar Akselsen vóru meistarar fyri fyrsta málinum. VB verjan tóktist illa skipað, tá tríggir spælarar eltu Sonna, sum snaraði út frá, áðrenn hann spældi Tór–Ingar, sum var púra blankur dygst úr málinum. Hannus Olsen javnaði úr ellivu metrum. Aftur var Tór–Ingar høvuðsleikari, tá verjan tók beinini undan honum.

Og í evstu løtu fekk heimaliðið sigursmálið, meðan vágbingarnir vóru púra skelkaðir. Aftasti maður hjá FSV, Jákup Joensen, sum ikki hevur spælt so nógv, sendi ein langan bólt fram á VB hálvuna. Tór–Ingar var hægstur og snittaði við høvdinum víðari. Aftur sviku eftiransingarnar, soleiðis at bæði Kim Poulsen og Sonni Johansen vórðu púra leysir, tá hesin seinni nevndi skoraði sigursmálið.

## Vágbingur í FSV

Omanfyri nevndu vit, at ein vágamaður, Birgir Jørgensen, var í VB álopinum, og at hann skoraði annað málið.

Merkisvert var tað, at ein vágbingur í 2. hálvleiki varð settur inn á liðið hjá FSV. Talan var um Per Joensen, sum hevur spælt nógv á næstbesta liðnum hjá VB. Hann hevur síðstu tíðina verið nógv í Vágum, har hann hevur nýtt høvið at venja við FSV, og sunnudagin varð hann fyri fyrstu ferð settur á vøllin. Støðan var 1–0 til barndómsfelagið hjá Peri, tá hann kom inn, men nýggja felagið hjá honum vann 3–2.

**FS Vágar:** Arturas Ramoska – Ruslan Screlea, Jákup Joensen, Poul Kjartan Thomsen – Kim Poulsen, Tór–Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Jón Nielsen, Jack Johansen – Birgir Joensen, Sonni Johansen

**VB:** Bjarni Johansen – Marner Richard, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Jón Gærdbo, Tórður Holm, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Birgir Jørgensen

# B36 gjørdi sína skyldu – men ikki meir

**B36 gjørdi leygardagin sína skyldu, tá teir á heimavølli fingu trý stig móti NSÍ. Men tað var um reppið, at NSÍ fekk stig við sær aftur til Runavíkar. Tá avtornaði var munurin bert eitt mál, sum kom beinanvegin í dystinum**

STEFAN Í SKORINI
*Fótbóltur*

Tað var eitt krav til B36 at vinna dystin, tá teir leygardagin tóku ímóti NSÍ á heimavølli. Oddaliðið GÍ hevði nevniliga vunnið kvøldið fyri, og tískil var ein sigur neyðugur, um B36 ikki skuldi missa GÍ úr eygsjón.

## Góð byrjan hjá B36

B36 fekk eina sera góða byrjan, tí tá bert tveir minuttir vóru farnir, lá bólturin í NSÍ málinum. John Petersen fekk bóltin í høgru síðu, og við einum sera neyvum innleggi fann hann Heðin á Lakjuni, sum eitt sindur úti frá skallaði bóltin niður í handara málhorn, uttan nakran møguleika hjá Jens Martini Knudsen at bjarga. Eitt sera vakurt mál.

Tríggjar minuttir seinni hevði B36 ein gyltan møguleika at økja um leiðsluna og sostatt veruliga seta seg á dystin. Magni á Lakjuni gjørdist leysur eftir langt útspark frá Tróndi Vatnhamar í B36 málinum, men við einum lobbara fór bólturin uppum Jens Martin og á tvørtræið, og sostatt var støðan óbroytt 1-0 til B36.

Tað luktaði av stórsigri til B36, men sum hálvleikurin leið mentist NSÍ liðið, og fleiri ferðir var vandi á ferð frammanfyri B36 málinum, tó uttan at nakað spurdist burturúr. Fleiri vandamikil innlegg, tvey fríspørk beint uttan fyri brotsteigin og annars spæl frammanfyri B36 málinum var tó ikki nóg mikið hjá NSÍ at javna.

## Málleysur annar hálvleikur

Tá annar hálvleikur var farin í gongd sást beinanvegin, at NSÍ liðið legði seg fram og vildi hava mál. Fleiri vandamikil innlegg vóru og nakrar skotroyndir, men eins og í fyrra hálvleiki vóru NSÍ leikararnir ov óvandamiklir frammanfyri B36 málinum.

B36 hevði eisini sínar royndir, men samanumtikið tóktist NSÍ liðið at vera meiri ágangandi enn B36. Havnarmenninir vóru óhepnir við skaðum bæði áðrenn og í dystinum, tí umframt at Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen og Pól Thorsteinsson sótu uttanfyri, noyddust bæði Fróði Clementsen og Bjarni Prior at fara út við skaða, og vóru teir avloystir av ávikavist Herbert í Lon Jacobsen og Eyðun Højgaard.

## B36 kundi avgjørt

Móti endanum av dystinum dovnaði NSÍ liðið eitt sindur aftur, og B36 hevði harafturímóti møguleikan at sláa sigurin fastan. 18 ára gamli Heini í Skorini kom inn fyri Magna á Lakjuni og fekk sín fyrsta dyst á 1. deild, tá tíggju minuttir vóru eftir. Sami Heini í Skorini kundi avgjørt dystin til fyrimuns fyri havnarliðið, tá hann eftir at vera farin framvið Djóna N. Joensen gjørdist leysur við Jens Martin Knudsen úr spískum, men Jens Martin bjargaði við beininum.

Einki mál kom afturat í dystinum, og gjørdi havnarliðið tí sína skyldu, men ikki meir enn tað. 1-0 til B36 var endaliga úrslitið, og sostatt hótta teir enn suverena oddaliðið í Gøtu.

## GÍ ella B36

NSÍ kundi eins væl fingið javnleik, men hóast nógv spæl og vandamikil álop spurdist ov fáir málmøguleikar burturúr, og við tapinum nærkast NSÍ botninum í 1. deild, hóast teir við spælinum í Gundadali leygardagin avgjørt vístu sínar dygdir.

Við sigrinum varðveitti B36 spenningin í oddinum í føroysku 1. deild, og 5 stig skilja framvegis GÍ og B36, meðan hini oddaliðini eftir úrslitini í vikuskiftinum ikki tykjast hava møguleikan at vinna FM. Væntandi verður seinna hálva í 1. deild eitt “Two horse race” millum GÍ og B36.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Sandoyingar fóru aftur í fýrsini

**Á Mølini megnaðu heimamenninir ikki í 2. hálvleiki at vera spælstýrandi, tá gestirnir góvu teimum størsta partin av vøllinum at spæla á**

*EB/Streymur megnaði ikki at koppa B71*



B71 spælararnir vóru ovurfegnir, tá Lassin Isaksen bríkslaði fyri seinastu ferð á Eiði leygarkvøldið. Teir høvdu vunnið stevnudystin og harvið steypið, sum Idé húsið hevði latið. Kortini var tað nógv týdningarmiklari enn steypið, at B71 menninir kundu fara um Skopunarfjørð við øllum stigunum. Viðførið hevði við sær, at sandoyingar komu undan aftasta plássinum, og tann veruleikin ber møguleikar við sær til, at teir framvegis kunnu sleppa av næstniðasta plássinum.

Tað ber væl til at siga, at sandoyingar leygarkvøldið fóru aftur í fýrsini. Í hendinga torførari skaða og leikbanna støðu vóru teir noyddir at grava fleiri veteranar framaftur. Eli Hentze og Kári Reynheim kunnu vit siga eru vanligir veteranar. Ib Mohr Olsen og Páll á Reynatúgvu kunnu vit kalla superveteranar. Tað sást væl, at teir hava ikki vant nakað serligt, men allir hesir fýra hava royndirnar, sum eru so sera týdningarmiklar, og teir brúktu tær til fulnar.

Áðrenn vit fara víðari við sjálvum dystinum, so mugu vit skunda okkum at leggja afturat, at tað munnu vera fá pláss í allari verðini, har landskappingardystir í fótbólti á hægsta stigi eru á skránni, at umhvørvið er so hugtakandi, sum tað var í dýrdarveðrinum á Mølini leygarkvøldið. Vatnið, Mølin, Flógvin, silvitnið, Kollurin, bakkin, høgu fjøllini fyri sunnan og áskoðararnir, ið tóktust sita sum fuglar á rókunum var ein sjón, sum neyvan sæst nógva staðni, har teir stríðast í UEFA og FIFA høpi.

## Dreymurin veruleiki

Tað sigur seg sjálvt, at tá talan er um sovorðið høkjulið, sum tað teir í B71 vóru noyddir at koma til Eiðis við, so er útgangsstøðan ikki at bjóða av í kapprenning um stigini.

B71 vildi hava EB/Streym at bjóða av, og so vildu teir bíða eftir møguleikunum at fara í snarálop. Hesar fyritreytirnar styrknaðu nógv, tá B71 í fyrsta gjøgnumspælda álopinum fekk hol á. Eftir uppspæl í høgru legði Kári Reynheim innfyri, Kári Sørensen var fyrstur á innlegginum, og bólturin endaði í kassanum aftanfyri Gunnar á Steig.

EB/Streymur svaraði beinanvegin aftur, og tað var vorðið sum mál. Eftir fínt innlegg úr høgru tamdi Sorin Anghel, sum í 1. hálvleiki var eyðsýndur, men sum fánaði alt meiri eftir steðgin, sera hegnisliga, áðrenn hann beindi bóltinum í málið.

Sandoyingar løgdu seg framum aftur. Enn eina ferð gekk uppspælið fyri seg í høgru, og enn eina ferð átti Kári Reynheim innleggið. Julian Floresco, sum var so mikið pjøssaður saman, at hann kundi spæla í ein góðan tíma, rann í bóltin og drønstútaði í málið, og so var B71 aftur omaná.

Tað stóra korterið, sum var eftir av 1. hálvleiki, var tað stak undirhaldandi. Ferðin var høg, Jón Sigurd Gleðisheygg, Sorin Anghel og Andrzej Pacek (fínt langskot) høvdu møguleikar at javna, og í hinum endanum hevði B71 í snarálopum tveir risastórar møguleikar at økja um leiðsluna. Eli Hentze stútaði eftir frísparksinnlegg í stólpan, og so var tað um reppið, at tað eydnaðist at lobba upp um málverjan, men bólturin endaði í føvninginum á Gunnari á Steig.

## Hugflogið burtur

Í 2. hálvleiki myndaðist tað akkurát, sum tað kundi roknast við. Sandoyarliðið tók nógv fólk aftur á egna hálvu. Kári Reynheim var einsamallur frammi. Hann fekk fatur á fleiri bóltum og dugdi at fáa innkøst og fríspørk burturúr.

Í hinum endanum sást væl, at heimamenninir trivust ikki serliga væl í leiklutinum at mynda spælið heldur enn at bíða eftir snarálops møguleikum. Teir á EB/Streyma liðnum gloymdu at toga spælið langt út í borðini og at royna við longum skiftum og yvirlappum, soleiðis at gomlu menninir hjá teimum gulu og bláu høvdu verið noyddir at renna og harvið møðast. Í staðin var ferðslan á miðásinum stór, og tað var matur fyri Páll á Reynatúgvu, Ib Mohr Olsen, Bernhard Petersen og Bergleif Sólsker, sum bakkaðu hvønn annan upp og hildu heimamenninar frá fatinum.

Stóra trýstið hevði fleiri spentar støður við sær. Eftir horna úr høgru stútaði Pacek aftanfyri handara stólpan og tvørtur um aftur, har Jón Sigurd Gleðisheygg var púra leysur, tá hann ein metur frá mállinjuni stútaði skeivu megin tvørtræið.

Høgu bóltarnar, sum EB/Streymur legði í brotsteigin, tók Nowisci í B71 málinum sær fyri tað mesta av. Heimaliðið skifti fólk, men tað segði tað sama.Fyri aðru ferð í ár tapti EB/Streymur ímóti B71, sum fekk í bjargingarlínuna. Og so skal leggjast afturat, at í gleðisrúsinum hóttu B71 menninir við, at teir ongantíð aftur skulu brúka Páll á Reynatúgvu og Ib Mohr Olsen í bestu deildini. So er tað komið upp á prent!

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Ólavur Poulsen, Alfred Jacobsen, Christian Carlsson – Halltórur Joensen, Knút Vesturtún, Andrzej Pacek, Andreas Dahl, Eyðfinn Joesen – Sorin Anghel, Jón Sigurd Gleðisheygg

**B71:** Valdemar Nowisci – Bergleif Sólsker, Ib Mohr Olsen, Bernhard Petersen – Kári Sørensen, Símun Hansen, Eli Hentze, Páll á Reynatúgvu, Hans Jørgen Djurhuus – Kári Reynheim, Julian Floresco

# Finnur Hansson aftur í Hoyvík

**Eftir at H71 fyrst hevði fingið fatur á tveimum av størstu skjúttunum í Føroyum, hava teir nú verið í Íslandi eftir einum væl kendum spælskipara**

Tað hevur eitt skifti ligið á ljóði, og fyrrapartin fríggjadagin var tað endaliga greitt. H71 hevur gjørt avtalu við íslendingin Finn Hansson um samstarv komandi ár. Finnur kemur til Føroya í august, og so fer hann at venja saman við hinum hoyvíkingunum.

Sverri Jacobsen er venjari, og eingin ivi er um, at teir í H71 miðja høgt. Tað verður roknað við, at nýggja høllin í Hoyvík verður klár at taka í nýtslu undan ársskiftinum. Tað vil siga, at tað verður møguleiki hjá hoyvíkingum at spæla heimadystirnar í endaspælinum á sonnum heimavølli, har felagið í Hoyvík ivaleyst fer at kenna seg uppaftur meiri heima, enn teir hava gjørt í hinum hallunum.

Tað ber ikki til at siga annað, enn at hoyvíkingar hava brynjað seg so mikið væl út, at teir nú í summar mugu metast at fara at teljast millum mest spennandi liðini í hondbóltinum í vetur. Í Finni Hansson hava teir fingið ein sera góðan spælskipara. Tað er sera týdningarmikið, tá felagið hevur tveir av bestu skjúttunum í landinum. Her verður hugsað um Hallger Dahl Olsen og um Bjarna Wardum, sum fyrr í summar gjørdi av, at hann komandi ár skal skifta barndómsfelagið Kyndil út við H71.

Finnur Hansson er ikki ókendur í Hoyvík. Hann spældi við H71 í 1997. Árið eftir fór hann til Neistan, og var ein av høvuðsstuðlunum, tá Neistamenn spældu seg til FM heitið.

Síðani Finnur Hansson fór aftur til Íslands, hevur hann spælt við FH á Hafnafirði. Nú kemur hann aftur til Hoyvíkar, og spenningurin í Hoyvík er stórur, hvussu nýggja hondbóltsárið fer at hilnast hjá H71.